

*Laura Christensen, Julie R. Ølgaard og Neel Grønholt á veg úr Limosininum og á tað reyða teppið*

*Mynd: Tina Jøhnk Christensen, Alloverpress*

## Kjólarnir:

- Kjólin hjá Julie R. Ølgaard er ein nýmótans Marilyn Monroe. Koralreyður kjóli úr silkichiffon við armygrønum silkibondum. Hon ynskti ein kjóla, sum var ungdommiligur, og sum ikki var ov berur.
- Laura Christensen fekk ein gudinnukjóla til høvið. Gull/metallic kjoli við ermum, seymaður úr haute couture toyið og chiffon. Hon ynskti sær ein gudinnu-líknandi kjóla.
- Kjólin hjá Neel Grønholt var ein grafiskur kjóli í havfrúgvasniði. Lillaður við svørtum bondum um ryggin. Hon ynskti ein grafiskan, ungdommiligan kjóla.

Allar tríggjar sjónleikarinnurnar hava verið í sambandi við COLLINdamHANSEN síðani Oscarhandanina, og tær høvdu fingið nógvar viðmerkingar í Hollywood um teirra sermerktu og vøkru kjólar. Tær hava eisini bjóðað seg fram at vera modell til fyrstu kollektiónina, sum skjótt verður løgd út á netið.

Tær hava nevniliga allar tríggjar arbeitt seg upp frá grundini, og eru í dag viðurkendar sjónleikarinnur. So tær vita, hvussu langur vegurin upp á toppin er, og vilja fegnar geva føroysku sniðgevunum eina hjálpandi hond.

---

sum so verður sýnd fram á stóru mótamessunum. Um várið síggjast klæðini fyri heyst/vetur og um heystið síggjast klæðini fyri vár/summar. Teir arbeiða altso ½ ár frammi í tíðini, men tað, sum handlarnir bíleggja, skal so hópframleiðast so hvørt. Sum er hava tær tríggjar ongan møguleika at arbeiða soleiðis.

– Málið er sjálvandi at koma við á slíkar messur, og at kunna selja til handlar. Men tað krevur fíggjarliga orku, og tí leita vit nú eftir áhugaðum íleggjarum, sum kunnu føra okkum eitt stig longur, greiðir Annfríð frá.

Hon leggur afturat, at tær ynskja at fáa íleggjarar upp í COLLINdamHANSEN sum skjótast, tí tær hava framvegis ikki slept vónini um at sleppa við á mótamessuna í august, har vár/summar mótin fyri 2009 verður sýndur fram.

– Vit hava havt eina góða og óvanliga byrjan, men hóast tað er vegurin bæði langur og tungur fyri framman. Tað eru nógvir sniðgevar í Danmark, og kappingin er hørð. Men vit halda okkum hava ein heilt serligan stíl, sum ikki er serliga væl umboðaður á mótamarknaðinum, sum er. Dreymurin er, at hetta verður okkara fulltíðarstarv, og at vit fara at hava fleiri viðurkendar handlar við COLLINdamHANSEN klæðum kring alt Danmark, sigur Annfríð Hansen.

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

### COLLINdamHANSEN eru:

Anja Collin 36 ár úr Havn, útbúgvin sniðgevi við nógvum royndum, m.a. sum chef-sniðgevi bæði hjá kenda barnamerkinum Italy kids og hjá kenda merkinum Kammakarlo

Stefania Dam, 29 ár úr Kollafirði, arbeitt sum skraddari í fleiri ár, drúgvar arbeiðsroyndir. Er nú undir útbúgving til námsfrøðing.

Annfríð Hansen, 35 ár av Toftum, hárfríðkanarkvinna við egnari salong, nevnd Hansen & Zeneli, í Keypmannahavn. Hevur tó altíð fingist við seyming og sniðgeving til heimabrúk